Neytakonan – ein horvin vinnumynd

Húsarhaldsskúli Føroya hevur í heyst skipa› fyri einari evnisviku um neytakonuna. Í hesum sambandi ver›ur almenn kvøldseta á skúlanum hóskvøldi› 16. november, har m.o. Ey›un Andreassen, fólkalívsfrø›ingur, fer at siga frá.

Kvinnur í bólki vi› bi›i á bakinum og dyllum á ørmunum - trúliga sóust tær mál eftir mál fara gangandi út um bøgar›arnar og eftir útint arbei›i at koma aftur.

Myndin hevur hugtiki› mong, bæ›i myndlistafólk og skrivandi fólk. Christian Matras gevur okkum eina so inniliga l‡sing av hesum kvinnum:

Neytakonurnar ganga nú
sunnan úr høgum
vi› bi›um á baki og
mó›ar í knøum.
Skvatlar mjólk í bi›i, og
prikar undir iljum
lyngurin á hei›i og
eyrurin í giljum.
Heima liggur lítlin og
svevur.

Hendan myndin er farin í søguna. Men tíbetur eru kvinnur, sum ógvuliga væl minnast hesa tí›, og sjálvar hava tiki› lut í hesum arbei›i.

Harafturat er innan si›søguligu bókmentirnar eisini tilfar um neytakonuna og virki hennara.

Álvara og gaman

Ikki gekst altí› sum fótur í hosu hjá neytakonunum. Dømi um hetta finna vit hjá Roberti Joensen:

„Ta› hendi seg, at neytakonur grísa›u. Ta› vil siga, at tær komu aftur til gar›s vi› ongari mjólk, tí tær fyri mjørka ella tjúkn ikki kundu finna neytini. Úr einari bygd ver›ur greitt frá, at tá i› neytakonur høvdu grísa›, fingu tær greyt. Grísagreyt kalla›u tey hann.“

Tær dugdu eisini at hugna sær:

„Tá vit hildu neytakonugildi, læt hvørt hús, har neytakona var, eitt ella tvey stykkir av røstum kjøti. Ræst kjøt, súpan, epli og brey› og anna› meir var gildismaturin.“ (Brot úr bókini „Høgtí›ir og veitsluhald á vetri“).

Men sigur hetta so ungum fólki í dag yvirhøvur naka› sum helst?

Evnisvika

Á Húsarhaldsskúla Føroya hildu tey í øllum førum neytakonuna vera so miki› áhugaverda, at tey avgjørdu at hava eina evnisviku um hana.

Hetta arbei›i› er li›ugt nú, og m.a. hava næmingarnir gjørt klæ›-ir til hvørt sína dukku, solei›is at tær eru ílatnar búna, sum var vanligur hjá neytakonum.

Til tess at henda evnisvika skal røkka út um gátt skúlans, ver›ur nú skipa› fyri einari almennari kvøldsetu.

Frásagnir og tónleikur

Talan ver›ur eftir øllum at døma um eitt sera áhugavert kvøld.

Kvøldsetan byrjar vi›, at Jóhanna á Tjaldrafløtti, lei›ari á skúlan-um, b‡›ur vælkomin.

Sí›ani fer Paulina Eliasen, lærari í handar-bei›i, at grei›a frá evnisvikuni, og ver›ur ta› serliga frá handaliga partinum, sum umfata›i arbei›i› at gera neytakonubúnan upp á dukkurnar.

Ein av teimum kvinnum, sum sjálv hevur veri› neytakona, er Hanni Poula Jensen, ætta› úr Hvannasundi og búsitandi í Klaksvík. Hon fer at siga frá tí›ini, tá hon gekk til neytar.

Ey›un Andreassen, fólkalívsfrø›ingur, fer harnæst at halda fyrilestur, sum hann nevnir „Pátrúgv og si›ir í samband vi› húsdjórahald“.

Millum næmingarnar á skúlanum eru fleiri, sum duga væl at spæla og syngja. Nakrar gentur fara at hava tónleikaframførslur - bæ›i floytuspæl og sang - millum frásagnirnar.

Her ver›ur talan um bæ›i klassiskan tónleik og n‡ggjari sangir.

Felagssangur ver›ur eisini á skránni, og harafturat bjó›ar skúlin kaffi og kakur.

Kvøldsetan hóskvøldi› 16. november er almenn og ókeypis, og hon byrjar kl. 20.

Samgongan ger mismum



Vilhelm Johannesen vil hava at vita, hví landsst‡ri› ikki hevur bo›i› út arbei›i› at skifta motorarnar á Ternuni, og hví onnur almenn arbei›i ikki ver›a bo›in út

FYRISPURNINGUR
Magnus Dam

Vilhelm Johannesen úr Javna›arflokkinum heldur, at samgongan tosar vi› tveimum tungum, tá i› ta› sn‡r seg um at bjó›a út almenn arbei›i. Í einum fyrispurningi til Bjarna Djurholm, landsst‡rismann í vinnumálum, vil Vilhelm Johannesen hava at vita, hví øll almenn arbei›i ikki ver›a bo›in út.

– Markna›arbúskapur er høvudsherrópi› hjá samgonguni. Hetta ætlar samgongan at fremja vid stø›ugt størri kapping. Vápnini eru privatisering og útlisitering. Almennu stovnarnir skulu broytast til almenn partafeløg vi› tí fyri eyga, at partabrøvini seinni ver›a seld privatum- og møguliga eisini útlendskum áhugamálum, sigur tingma›urin.

Vilhelm Johannesen undrast á, at samgongan tosar so nógv um markna›arbúskap og fría kapping, samstundis sum almennir stovnar lata stór arbei›i gera, uttan at tey ver›a bo›in út í fríari kapping.

Feskasta dømi› um hetta er Ternan, sum í hesum døgum fær bá›ar motorarnar skiftar, uttan at hetta var› bo›i› út. Eg eri vitandi um, at a›rar skipasmi›jur og mekaniskir verksta›ir eru í Føroyum, sum eru før fyri at gera slík arbei›i, og sum høvdu lati› tilbo› inn, um arbei›i› var› bo›i› út, sigur Vilhelm Johannesen í fyrispurninginum til Bjarna Djurholm.

N‡ggja Ternan liggur í løtuni á Tórshavnar Skipasmi›ju, har motorarnir ver›a skiftir.

D‡rar sparingar

FYRISPURNINGUR
Magnus Dam

Landi› ger sær sjálvum eina bjarnatænastu vid at spara uppá uppvenjingartilbo› til rørslutarna›ar føroyingar. Hesi fólkini verda send av landinum í sta›in fyri at fáa tilbo› um uppvenjing her heima, og tad kann ikki loysa seg, heldur Rúna Sivertsen, tingkvinna hjá Fólkaflokkinum.

Hon hevur tí sett Helenu Dam á Neystabø, landsst‡riskvinnu í almannamálum, ein fyrispurning, har hon vil hava at vita, um nøkur ætlan er um at gera eina skipan fyri tey rørslutarna›u. Eina skipan, har fólk fáa ney›ugu venjingina heima í Føroyum heldur enn í Danmark og a›rasta›ni.

Rúna Sivertsen vísir á, at venjing og veglei›ing í gó›ari tí› hevur stóran t‡dning. Í dag finst eingin skipan, har tey, sum hava sklerosu, heilaskada, vøddasvinn og a›rar sjúkur, kunnu fáa ney›ugu uppvenjingina. Men at tørvur er á hesum tilbo›unum, kunnu áhugafeløgini hjá teimum rørslutarna›u vísa á.

Tad eru fleiri gó›ar grundgevingar fyri hesum pástandinum. Fáa tey rørslutarna›u uppvenjing rættstundis, hava fleiri teirra kanska ikki tørv á koyristóli, sum kostar nógvan pening. Tey gerast meira sjálvbjargin, og minni tørvur ver›ur á hjálparfólki. Milliónir kunnu sparast á forsorgarlógini, tí ta› ver›ur ikki neydugt at senda fólk av landinum. Harumframt ver›ur ta› heldur ikki ney›ugt vi› líka nógvum skur›vi›ger›um, sum kosta nógvan pening.

Rúna Sivertsen heldur, at ta› ver›ur d‡rari fyri

landskassan ikki at seta eina skipan vi› venjingartilbodum í verk í Føroyum.

– Skjótari ein skipan kemur at virka, betri fáa vit fyribyrgt, at rørslutarna› smábørn gerast so óhjálpin, at tey enda í eini pensiónsskipan í sta›in fyri at gera samfelagsliga nyttu, sigur Rúna Sivertsen í fyrispurninginum til Helenu Dam á Neystabø.

Tosa vi› tveimum tungum

Tórbjørn Jaconsen hevur sagt vi› íslendska sjónvarpi›, at landsst‡ri› ætlar, at Føroyar skulu hava fullveldi í 2006 ella 2007. Løgma›ur heldur kortini fast um, at landsst‡ri› ikki hevur ásett naka› áramál

Meldingarnar frá landsst‡rinum um fullveldismáli› halda fram at vera sera ymiskar. Tjó›veldisflokkurin sigur, at vit fáa fullveldi innan 6 ár, men løgma›ur sigur, at landsst‡ri› ikki hevur ásett naka› áramál

FULLVELDI
John Johannessen

Løgma›ur kennir einki til, at landsst‡ri› ætlar, at Føroyar skulu hava fullveldi innan 2006 ella 2007.

Kortini halda landsst‡rismenn Tjó›veldisfloksins á at melda út, at Føroyar ver›a fullveldisríki innan hetta áramál.

T‡skvøldi› vísti Sjónvarp Føroya eina samrø›u, sum íslendska sjónvarpi› hev›i gjørt vi› Tórbjørn Jacobsen, landsst‡rismann, í sambandi vi› fullveldisætlanina. Í samrø›uni seg›i Tórbjørn Jacobsen, at rokna› ver›ur vi›, at Føroyar ver›a republikk í 2006 ella 2007.

Høgni Hoydal, sum er varaløgma›ur og harafturat landsst‡risma›ur vi› ábyrgd fyri sjálvst‡rismálum, hevur melda› ta› sama út í fjølmi›lunum. Hetta gjørdi hann í vi›merking, hann sendi blø›unum, tveir dagar eftir, at landsst‡ri› á tí›indafundi hev›i kunngjøry n‡ggju sjálvst‡risætlanina.

Høgni Hoydal seg›i í vi›merkingini, at landsst‡ri› ætlar, at í seinasta lagi 2006 skulu øll málsøki vera komin undir føroyskt lóggávuvald og heimast‡rislógin avrigga›. Samstundis vísti hann eisini á, at hetta sjálvsagt kann gerast innan ta tí›.

Løgma›ur harta›i í fjølmi›lunum Høgna Hoydal eftir hesa vi›merking og gjørdi greitt, at landsst‡ri› ikki hev›i ásett naka› áramál fyri, nær vit skulu hava fullveldi.

Ta› sama ger løgma›ur nú eftir útmeldingina frá Tórbjørn Jacobsen.

– Landsst‡ri› gjørdist herfyri samt um eina felags útmelding. Og ta› er hendan sama útmeldingin, sum enn er galdandi. Alt hitt er at tosa vi› sí›una av tí, sum landsst‡ri› er samt um, sigur løgma›ur.

Anfinn Kallsberg ger greitt, at ta› ver›ur fólki›, sum á teirri seinnu av teimum bá›um ætla›u fólkaatkvø›unum kemur at gera av, nær tí›in er búgvin at taka fullveldi.

Løgma›ur ásannar, at ta› er óheppi, at landsst‡rismenninir koma vi› slíkum útmeldingum. Men hann vil ikki siga, um hann fer at geva teimum átalu fyri sínar ger›ir.

– Hvat eg fari at gera í hesum málinum er ikki naka›, sum eg fari at kunngera í pressuni, sigur løgma›ur.

Veljarakanning kunngjørd í dag

Útvapi› og Dimmalætting kunngera í dag eina veljarakanning um gongdina í fullveldismálinum

VELJARAKANNING
John Johannessen

Seinnapartin í dag fara Útvarpi› og Dimmalætting at almannakunngera eina veljarakanning, sum millum anna› sn‡r seg um gongdina í fullveldismálinum.

Í kanningini er fólk millum anna› spurd, hvør tey halda eigur at lastast fyri, at samrá›ingarnar vi› danir hava gingist so illa, sum tær hava.

Eisini eru fólk spurd, hvørjir tveir av teimum stóru flokkunum tey meta vera best egna›ar at fáa eina gó›a avtalu í lag vi› danir.

Umframt hetta eru fólk spurd teir vanligu spurningarnar, um hvønn flokk, tey høvdu valt um val var› í morgin, hvønn tey meta vera best egna›an til løgmann og so fram vegis.

Ta› er eins og á›ur Fynd, sum hevur gjørt vejarakanningina fyri Útvarpi› og Dimmalætting.

Mugu hava fjølmi›laábyrgd

Tingma›urin, Hans Pauli Strøm, setti í tinginum í gjár Høgna Hoydal munnligan fyrispurning um, hvat landsst‡risma›urin ætlar at gera fyri, at ein fjølmi›laábyrgdarlóg kann setast í gildi sum skjótast

FYRISPURNINGUR
John Johannessen

Hans Pauli Strøm, tingma›ur, heldur ikki, at vit longur kunnu bí›a eftir einari fjølmi›laábyrgdarlóg frá landsst‡rinum.

Á tingfundinum seinnapartin í gjár, har munnligir fyrispurningar vóru á skránni, vildi Hans Pauli Strøm hava at vita frá Høgna Hoydal, hvat hann higartil hevur gjørt, so at ábyrgdarlóggávan á fjølmi›laøkinum ikki framvegis skal liggja í órøkt, og hvat Høgni Hoydal ætlar at gera fyri, at ein fjølmi›laábyrgdarlóg kann setast í gildi sum skjótast.

Átrokandi mál

Hans Pauli Strøm heldur, at ta› er alney›ugt at fáa eina fjølmi›laábyrgdarlóg setta í gildi í Føroyum, so skjótt sum ta› yvirhøvur ber til.

– Vit skulu helst um ikki so langa tí› út í eitt valstrí› upp undir eina avgerandi fólkaatkvø›u um ríkisrættarliga spurningin. Hetta ver›ur uttan iva eitt eljustrí› av einari a›rari ver›. Tí haldi eg, at ta› er alney›ugt, at vit fáa eina fjølmi›laábyrgdarlóg á›renn valstrí›i› til fólkaatkvø›una byrjar, sigur Hans Pauli Strøm.

Tingma›urin vísir á, at vit longu hava tvey aktuell dømi um, at tveir politikarar eru ærumeiddir í fjølmi›lunum í sambandi vi› hugsanir teirra um ríkisrættarligu stø›una. Høgni Hoydal var› í einum dulnevndum lesarabrævi í einum l‡singabla› herfyri settur í samband vi› sjálvan hin versta og Jóannes Eidesgaard var› í einum prikandi tátti í Útvarpinum sk‡rdur at vera landasvíkjari.

Bá›ir hesir politikararnir hava fingi› umbering. Men ynsktu teir at fáa sta›fest, at Útvarpi› og l‡singabla›i› hava bori› seg skeivt at, hev›i einasti møguleikin veri›, at teir kærdu mi›larnar fyri rættin.

– At kæra mi›lar fyri rættin er naka›, sum fólk flest aftra seg vi›, og ta› er eisini ein sannroynd, at advokatar aftra seg vi› at taka slík mál upp. Tí er ney›ugt, at vit vi› einari fjølmi›laábyrgd kunnu fáa eina nevnd, sum fólk kunnu kæra til, og sum sí›ani kann átala mi›larnar alment, sigur Hans Pauli Strøm.

Vilja hava donsku lógina

Í Danmark er ein n‡ggj fjølmi›laábyrgd sett i gildi fyri fáum árum sí›ani. Í 1992 vendi Løgmálará›i› sær til føroyingar og spurdi, um føroysku myndugleikarnir ynsktu at fáa hesa somu lógina setta í gildi í Føroyum sum ríkislógartilmæli. Fjølmi›laábyrgd er nevniliga ríkismál og finnist ikki millum A og B málini, sum kunnu yvirtakast eftir heimast‡rislógini.

Landsst‡ri›, sum sat í 1992 svara›i løgmálará›num, at ta› ynskti lógina setta í gildi í Føroym, men løgtingi› vildi hava nakrar ávísar broytingar í henni vi›víkjandi manningini í fjølmi›lanevndini.

Løgmálará›i› var ikki sinna› at ganga hesum ynski á møti, og kom máli› tí í drag.

Hans Pauli Strøm, tingma›ur, heldur ta› vera umrá›andi, at vit fáa eina fjølmi›laábyrgdarlóg á›renn eitt veruligt valstrí› undan eini fólkaatkvø›u um føroyskt fullveldi

Høgni Hoydal tók sí›ani máli› upp fyri skjótt einum ári sí›ani. Hann vildi smí›a ein føroyska fjølmi›laábyrgdarlóg, i› kundi setast í verk, tá fullveldismáli› í heyst var avgreitt. Men fullveldismáli› er komi› í drag, og tí ber enn ikki til at seta eina føroyska lóggávu í gildi innan hetta øki, uttan at landsst‡ri› fær eina avtalu vi› donsku stjórnina um at yvirtaka fjølmi›laábyrgd sum málsøki.

Hetta kann gerast ein drúgv gongd, og tí mælir Hans Pauli Støm til, at danska lógin ver›ur sett í gildi í Føroyum.

Jógvan Jespersen, útvarpsstjóri, og Jan Müller, bla›stjóri á Sosialinum, hava bá›ir í vi›merkingum í blø›unum sett fram ynski um, at ríkislógin um fjølmi›aábyrgd ver›ur sett í gildi fyribils, til málsøki› er yvirtiki› og ein føroysk fjølmi›laábyrgdarlóg er gjørd.

Ta› bar okkum ikki til at fáa svari› frá Høgna Hoydal á›renn bla›i› fór til prentingar.